# Høgni Lisberg hittar í Íslandi

Í kjalarvørrinum av AME Reykjavík er almenni hittlistin hjá íslendsku tónleika niðurtøku heimasíðuni tonlist.is almannakunngjørdur við føroyskur ísletti. Lagið Morning Dew hjá Høgna Lisberg liggur á 15. plássi hesa vikuna.

Høgni var mettur at vera høvuðsnavnið á AME-Reykjavík, og júst Morning Dew var nógv spældur í íslendskum útvarpi og sjónvarpi. Hetta sæðst nú aftur í sølutølunum, á listanum hjá tonlist.is, ið má metast sum einasti veruligi stakfløgu hittlisti í Íslandi. Eins og í Føroyum er sølan av stakfløgum næstan eingin, men eins og í restini av heiminum er niðurtøka av løgum á alnetinum ein vaksandi marknaður.

Tonlist.is almannakunngerð hvørja viku tey 20 mest niður tiknu løgini, og hesa vikuna er Høgni einasti útlendingur á listanum.

Høgni var nógv umbiðin maður í Reykjavík, og gjørdi samrøður bæði í útvarpi, sjónvarpi og stóru bløðunum.

Høgni sigur við Planet.fo, at hann er sera glaður um at vera komin inn á hittlistan, og at hetta vísir, at AME Reykjavík fyri hansara viðkomandi riggaði. Hann heldur somuleiðis, at tað er stuttligt at síggja, at okkurt hendir á alnetinum, her hevur hann ongantíð hitta áður.



*Høgni Lisberg var høvuðsnavnið á AME Reykjavík.*

## FØROYSKU BÓLKARNIR VÓRU Í HEIMSFLOKKI



*Ásgeir Eyþórsson og Niclas Johannesen í Ríkisútvarpshúsunum*

“Allir hesir bólkarnir kundu klára seg væl á samanborið við tónleikapallin í einhvørjum landi í heiminum”, segði íslendski samskiparin av AME-Reykjavík Ásger Eyþórsson, við planet.fo. Hann helt, at støðið á føroysku bólkunum var sera høgt, og við rætta hepninum og røttu sambondunum, kundu allir sum ein gera vart við ser uttanlands.

Sjálvur dámdi Ásgeir serliga væl Gestir, ið spældu sera sannførandi. Hann helt tó, at tað ivaleyst var Høgni Lisberg, ið hevði størstar møguleikar í Íslandi júst nú. Tí hansara tónleikur varð nógv spældur í útvarpi og sjónvarpi. Fólk tyktust at hava tikið hann til sín.

## SAMANSJÓÐAN AV FØROYSKUM TÓNLEIKARUM



*Hans Marius úr Marius og Hergeir úr Makrel hugna sær í Bláu Lón, við hvítari móru masku.*

Umframt at vaksa um áhugan millum íslendingar fyri føroyskum tónleiki, so hevði AME Reykjavík stóra jaliga ávirkan á samanhaldið millum føroysku bólkarnar. Føroyski tónleikapallurin kann ofta tykjast eitt sindur klikuttur, fólka í einum geografiskum umhvørvi halda mest saman við sínum egnu. Men á AME búðu allir luttakandi bólkar á sjómansheiminum og gjørdu nógv av at hugna sær saman. Á konsertunum, ið Deja Vu skipaðu fyri á Grand Rock møtti alt ferðalagið upp og stuðlaði hvør øðrum, um dagarnar fór fólk túrar saman t.d. í Bláu Lón og nýggj vinaløg vórðu knýtt.

## LENA Á RÁS 2

*Lena vitjaði snotiligu Ríkisútvarpshúsini í Reykjavík*



Føroysku luttakararnir á AME Reykjavík, vóru nógv í ymisku loftmiðlunum. Vit vóru við, tá Lena og Niklas vitjaðu og spældu tvey løg á Rás 2, ið er tónleikastøðin hjá Ríkisútvarpinum. Í tónleikasendingini hjá Águsti Bogasyni var Lena gestur, tey tosaðu um hana, um hennara tónleik og um hennara framtíðarætlanir. M.a. segði Lena, at hon væl kundi hugsa sær at komið aftur til Íslands og upplivað meira av landinum, enn hon sleppur hesaferð, tí longu mánadagin skuldi hon víðari til London at spæla inn. Lena og Niklas spældu løgini Stones In My Pocket og Dawn. Hetta eru tvey av sterkastu løgunum og er henda útvarpsframførsla uttan iva sera sølufremjandi fyri hennara fløgu, ið kom út í Íslandi fríggjadagin.

